# Frítíðarløn 2. mai 2006

**Frítíðarlønin verður útgoldin 2. mai 2006.**

Eigur tú frítíðarløn, fært tú eina fráboðan.

**Býrt tú í Føroyum**
Ert tú flutt/-ur, síðani tú boðaði fólkayvirlitinum frá, fer fráboðanin retur til Frítíðargrunnin.
Fyri at sleppa undan hesum skalt tú boða **fólkayvirlitinum** frá nýggja bústaðnum.

**Býrt tú uttanlands**
Býrt tú uttanlands, og ert tú flutt/-ur, síðani tú boðaði fólkayvirlitinum frá, fer peningurin eisini retur til Frítíðargrunnin.
Fyri at sleppa undan hesum skalt tú boða **Toll- og Skattstovuni**, ið umsitur Frítíðargrunnin, frá nýggja bústaðnum.

**Kontunummar**
Frítíðarlønin fyri 2006 fer á somu kontu sum í fjør. Vilt tú broyta kontunummarið, verður tú biðin um at boða okkum frá nýggja kontunummarinum.
Hetta kanst tú gera við at útfylla fráboðanina niðanfyri og senda okkum hana í seinasta lagi **18. apríl 2006**. Ella tú kanst útfylla fráboðanina á heimasíðuni www.tollskatt.fo.

Hevur tú spurningar, kanst tú ringja til okkum á telefon 35 26 00.
Vit svara mán. - hós. kl. 9.00 - 15.30, og frí. kl. 9.00 – 15.00

| | |
|---|---|
| P-tal: | |
| Navn: | |
| Bústaður: | |
| Postnr. og bygd/býur: | |
| Peningastovnur: (bert føroyskur) | |
| Kontunummar: | |

______________, / 2006 ______________
Undirskrift

Fráboðanin skal sendast til: Toll- og Skattstovu Føroya, Suðurøki
Postrúm 69
FO-800 Tvøròyri

## Fráboðan um umhvørvis-góðkenning

Við hesum verður gjørt kunnugt, at Heilsufrøðiliga starvsstovan tann 23. mars 2006, við heimild í grein 26 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd og kunngerð nr. 54 frá 3. mai 1994 grein 1, stk. 4, hevur góðkent:

**»Bunkringarskipan á Sundi**
**Ískoyti til umhvørvis-góðkenning til elverkið hjá SEV á Sundi«**

Góðkenningin liggur alment frammi á Heilsufrøðiligu starvsstovuni. Avgerðin kann kærast til landsstýrismannin í umhvørvismálum. Møgulig kæra skal sendast Heilsufrøðiligu starvsstovuni, Falkavegur 6, 2. hædd, FO-100 Tórshavn, í seinasta lagi fýra vikur frá dags dato.

Góðkenningin kann somuleiðis síggjast á heimasíðuni hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni, www.hfs.fo

**Heilsufrøðiliga starvsstovan**

# Starvsfólk til nýggja dagstovnin í Sørvági

Sørvágs kommuna søkir eftir:
1 varaleiðara at arbeiða 30-35 t/v,
11 pedagogum at arbeiða 30-35 t/v og
6 hjálparfólkum at arbeiða 30 t/v

at byrja 1. august 2006. Arbeiðstíðin er millum kl. 07.30 og 17.30.

Dagstovnurin er í 6 eindum, settur saman av vøggu-barnagarðstovum og frítíðarskúla.

**At byrja við verða tað:**
3 barnagarðsstovur
2 vøggustovur
1 frítíðarskúli við børnum frá 1. til 3. flokk

**Vit bjóða:**
Eitt áhugavert starv í einum umhvørvið tætt at náttúruni, har tú hevur møguleikan at seta tín dám á stovnin.

**Vit væntar at umsøkjarnir:**
- eru til reiðar at fara virknir inn í starvið, og saman við sínum starvsfelagum menna tað pedagogiska arbeiðið á stovninum
- eru til reiðar at luttaka á skeiðum ið hava tíðning fyri arbeiðið á stovninum
- eru til reiðar at menna og búgva seg til at taka ímóti avbjóðingum sum liggja fyri framman
- hevur hugsjónir, tá tað snýr seg um virksemi í einum barnagarði
- hava hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan dag, merktan av virðing fyri børnum, foreldrum og starvsfólkum
- eru jaligir og duga væl at samskifta
- hava hug at brúka náttúruna sum pedagogiskt amboð
- síggja møguleikar heldur enn forðingar
- kunnu virka fyri einari góðari mentan og samstarvi við starvsfelagar og foreldur

**Setanarviðurskifti**
Løn og setunarviðurskifti eru sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala arbeiðsgevarafelagið.

Umsóknir saman við upplýsingum um útbúgving, royndum og møguligum viðmælum skulu vera:

**Sørvágs Kommunu**
Att: Gitta av Kák leiðari
Varðagøta 8
380 Sørvágur

í hendi í seinasta lagi mánadagin 17. apríl 2006
Setanarsamrøðurnar verða í viku 18.

Meira fast at vita um størvini við at venda sær til Gittu av Kák leiðara á tlf. 229495

Um ikki nóg nógvir pedagogar søkja, verða hjálparfólk sett í tíðaravmarkað starv.
Viðmerk á brævbjálvan »**umsókn til dagstovnin**«.

**Sørvágs Kommuna**

**Mentamálaráðið**
*Vinnu- og Miðnámsskúladeildin*

# Stuðul til yrkisleiklist

Sambært løgtingslóg nr. 68 frá 2. mai 2003 um Tjóðpall Føroya og stuðul til leiklist v.m., og kunngerð nr. 18 frá 19. apríl 2004 um stuðul til leiklist v.m. verður við hesum kunnað um, at møguleiki er at søkja um stuðul til yrkisleiklist.

Umsóknarblað er at finna á heimasíðu Mentamálaráðsins: www.mmr.fo undir »Mentan« - »Oyðubløð«. Freistin at søkja er 31. mars 2006.

Viðv. treytum og møguleikum fyri stuðli verður víst til nevndu lóg og kunngerð.

Umsóknir skulu stílast:

**Mentamálaráðið**
**Postrúm 3279**
**110 Tórshavn**

Veitst tú eina góða?

Ring til Sosialin
tlf 341800



Sosialurin

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo